Herálvur Joensen, aðalstjóri í Oljumálaráðnum um boring við markið:

# Ómetaliga positivt fyri okkum

**– Tað er ómetaliga postivt fyri okkum, at tveir brunnar verða boraðir hinumegin markið í summar, nú tað hava verið útlit til, at als eingin boring fór at vera á øllum Atlantsmótinum í 2004 sigur Herálvur Joensen, aðalstjóri í Oljumálaráðnum, nú tíðindini herfyri bórust um, at ChevronTexaco og Amerada Hess fara at bora tveir brunnar í summar beint hinumegin markið**




*Bjarni Djurholm, nýggjur landsstýrismaður í oljumálum vitjar í Oljumálaráðnum. Herálvur Joensen tók ímóti*

*Mynd Jens K. Vang*

OLJULEITING
*Jan Müller*

– Tvær boringar aftrat er so tekin um, at tað er lív í, og uttan mun til úrslitið, so fer tað at geva eina ella aðra vitan, sum kann brúkast í víðari tilrættaleggingini. Og skuldi tað góða hent, at tað spurdist nakað veruligt positivt burtur úr, so hevur tað sjálvandi týdning fyri føroyska økið, bæði fyri almenna áhugan, fyri loyvini, sum eru nú, men ikki minst fyri eitt komandi útbjóðingarumfar, sum er í gongd, tá brunnarnir verða boraðir sigur Herálvur Joensen við Sosialin.

### 2. útbjóðing

Sosialurin skilur, at fólkini í Oljumálaráðnum av álvara eru farin í gongd við at fyrireika 2. útbjóðing á landgrunninum. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum hevur vitjað í Oljumálaráðnum og har mælt starvsfólkunum til at halda fram við fyrireikingunum av nýggjari útbjóðing. Sum skilst er ætlanin at fáa eitt uppskot liðugt umleið hálvan mars. Jarðfrøðissavnið er við at leggja sína seinastu hond á nominatiónina tvs. hvørji øki skulu vera við í eini nýggjari útbjóðing. Hetta fer so alt í tingið í vár. Tá tað so verður samtykt koyrir málið av sær sjálvum tvs. at útbjóðing fer fram og loyvi verða latin síðst í hesum árinum ella fyrst í komandi ári. Tað veldst so um, hvussu stór undirtøkan verður.

### Bretar linari treytir

Nú 2. útbjóðing verður á skránni verður uttan iva eisini neyðugt at endurskoða reglarnar, sum vórðu samtyktar við 1. útbjóðing.

Sambart altjóða oljublaðnum "Uppstream" eru bretar við at leggja síðstu hond á 22. útbjóðing í teirra øki, ein útbjóðing, sum fer at fevna um øki nær við føroyska markinum eisini. Sambart blaðnum verða krøvini linari enn fyrr, hetta fyri at fáa fleiri feløg at vísa áhuga. Herálvur Joensen vil ikki gera viðmerkingar til hetta málið í løtuni men staðfestir, at neyðugt verður at hyggja at reglunum eisini við kappingini við onnur øki fyri eygað.

### Órímulig skatting

Eitt mál, sum roknast kann við fer at verða lagt fyri nýggja landsstýrið, er spurningurin, sum felagið hjá oljufeløgunum, FOÍB, reisti á oljuráðstevnuni í desember mánað. Har varð tað víst á tað óhepna í, at útlendsk oljufólk, sum koma til Føroya í ørindum, skulu gjalda skatt her frá fyrsta degi. Táverandi landsstýrismaður, Karsten Hansen svaraði tá oljufeløgunum, at eingin broyting fór at verða gjørd, soleingi tað ikki finst ein dupult skattaavtala millum Føroyar og Bretland. Tað skilst, at FOÍB longu hevur sett seg í samband við myndugleikarnar við sama málinum.

### Lagna óviss

Nýggja samgongan, sum setti sær fyri at minka um talið á aðalráðum, arbeiðir í løtuni við at finna eina loysn, nú fleiri aðalstjórar eru til avlops. Tað hevur ljóðað, at Løgmansskrivstovan tekur sær av málinum og fer at taka eina avgerð ein av fyrstu døgunum. Enn er ógreitt, hvussu verður við aðalstjóranum í Oljumálaráðnum. Í dag eru 15 fólk í Oljumálaráðnum. Trý ella fýra av teimum flyta til Innlendismálaráðið, har tey skulu arbeiða við økismenning, umhvørvismálum og náttúrumálum. Hesi flyta helst út í Tinganes. Hini 11 fólkini koma so at arbeiða undir Vinnumálaráðnum, sum skal umsita oljuna, Jarðfrøðissavnið og orkumál. Helst verða tey verandi í bygninginum, har Oljumálaráðið og Jarðfrøðissavnið í dag húsast.

Bjarni Djurholm, oljumálaráðharri góðar vónir:

# Finna olju innan tvey ár

NÝGGJ ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*

Nýggi landsstýrismaðurin í oljumálum, Bjarni Djurholm, vitjaði í farnu viku í Oljumáráðnum, har hann prátaði við starvsfólkini. – Fyri meg er tað mest umráðandi, at arbeiðið uppá at fyrireika 2. útbjóðing heldur fram, og at øll orka verður løgd í at fáa eitt uppskot, sum eg kann leggja fyri tingið sum skjótast sigur Bjarni Djurholm. Hann vísir á, at fer tað út um tíðarfreistina fyri at leggja uppskot fyri tingið, so fer hann at fáa neyðuga stuðulin til at víkja frá freistini.

Landsstýrismaðurin heldur tað annars vera sera avgerandi hjá føroyskum myndugleikum at fáa oljufeløgini at varðveita áhugan fyri økinum, og sær hann eisini tíðindini um, at tveir brunnar verða boraðir hinumegin markið í summar sum eina greiða ábending um, at altjóða oljuvinnan hevur ikki slept Atlantsmótinum, tó at úrslitini hava verið í lækara lagi í eina tíð.

Bjarni Djurholm, sum roynir at seta seg væl og virðiliga inn í sítt nýggja málsøki, oljuleiting við Føroyar, sigur seg hava vónir um, at kolvetni verða funnin á landgrunninum innan fyri tvey ár, og at hetta fer at gera, at áhugin fer at vaksa fyri økinum sum heild og soleiðis, at vit kunnu fáa eina framleiðslu um ikki so mong ár.

Uppá fyrispurning hvat hann heldur um reglurnar, sum skulu galda fyri 2. útbjóðingarumfar sigur landsstýrismaðurin, at vit eiga at skipa reglurnar soleiðis, at vit halda fast um tann áhugan, sum var. –Er tað so, at viðurskifti tala fyri, at man skal gera reglurnar meira smidligar, so vil eg taka undir við tí. Men hetta er nakað, sum umsitingin má ráðgeva mær í.

Bjarni Djurholm hevur eisini kunnað seg um aktuella skattamálið, sum FOÍB, felagið hjá oljufeløgum, hevur reist. Hann ætlar sær ein av døgunum at taka ein fund við Bárð Nielsen, landsstýrismann í fíggjarmálum. –Tað ræður um at skipa viðurskiftini soleiðis, at fólk og feløg síggja okkum sum ein møguleika heldur enn ein trupulleika. Tað vil so altíð vera ein spurningur um at finna eina javnvág, har tað verður tikin hædd fyri okkara egnu ynskjum samtíðis, sum hugt verður at ynskjunum hjá oljufeløgunum. Man skal heldur ikki vera so restriktivur, at tað skapar minni møguleikar hjá øðrum at etablera seg her. Um oljufeløgini halda tað vera gott at gera íløgur her, so fer tað vónandi eisini at vera gott fyri okkum og øvugt.



*Nýggi landsstýrismaðurin í oljumálum er longu farin at fyrireika seg til spennandi avbjóðingarmar, sum liggja í at umsita hetta hansara nýggja málsøki. Føroyakortið er vorðið ov lítil, so nú hevur hann eisini allan landgrunnin og alt Atlantsmótið á vegginum í skrivstovuni í Tinganesi*



UTTAN ÚR HEIMI

# Barnadrápsmaður fyri rættin

**Fyri áttað árum síðani varð Belgia skakað, tá løgreglan avdúkaði, at Marc Dutroux hevði myrt fleiri børn. Nú kemur hann fyri rættin**

BARNAMORÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Marc Dutroux hevur sitið varðhaldsfongslaður síðani 1996, og nú skal hann í rættin ákærdur fyri at hava myrt, neyðtikið og burturflutt minst seks gentur, sum vóru ímillum átta og tólv ára gamlar. Meiri enn 450 vitni skulu avhoyrast, og roknað verður við, at rættarmálið fer at taka minst tveir mánaðir.

Nógvir belgiumenn kenna seg sannførdar um, at Marc Dutroux var ikki einsamallur um illgerðirnar, men at hann var í einum felagsskapi, har bæði politikarar, dómarar og løgreglufólk vóru limir. At málið ímóti honum ikki kemur fyri rættin fyrr enn nú skal hava samband við, at myndugleikarnir fyrst máttu tryggja sær, at felagar hansara ikki verða drignir upp í rættarmálið.

Marc Dutroux varð longu í 1989 dømdur 13 ára fongsul fyri at hava burturflutt og neyðtikið fimm gentur, men longu trý ár seinni varð hann latin leysur. Í 1996 varð hann aftur tikin. Tað eydnaðist honum at flýggja í 1998, men hann varð kortini tikin stutt eftir.

Nú hann kemur fyri rættin, skulu 300 løgreglufólk standa á varðhaldi við dómhúsið, og sjálvur skal tann ákærdi sita í einum skottryggum búri inni í rættarhølinum. Málið vakti stóran ans fyri átta árum síðani, og áhugin er ikki minni nú. Ikki færri enn 1300 fjølmiðlar kring allan heimin hava biðið um at fáa eitt umboð inn í rættarhølið.

Í Belgia bíða fólk spent eftir, um rættarmálið fer at avdúka, hvørt Marc Dutroux var einsamallur um illgerðirnar, ella um hann var limur í einum felagsskapi, sum misnýtti børn og skipaði fyri mannahandli.

# Royna at fáa forsetan frá við góðum



*Harðir bardagar vóru gjáramorgunin í býnum Cap Haitien, haðani hendan myndin er*

**Altjóða semingsmenn eru farnir til Haiti fyri at fáa tann umstrídda forsetan at leggja frá sær**

HAITI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Uppreistrarmenninir á Haiti hava gjørt greitt, at teir fara ikki at leggja vápnini, fyrr enn tann umstríddi forsetin, Jran Bertrand Aristide, hevur lagt frá sær ella er farin av landinum.

Nú royna altjóða semingsmenn at at finna eina semju. Eftir henni skal forsetin leggja frá sær ella lata ein part av valdinum frá sær. Tað ljóðar, at forsetin hevur góðkent ta seinnu loysnina, men at uppreistrarmenninir hava vrakað hana. USA, ES og fleiri onnur lond eru við í semingsroyndini.

Gjáranáttina tóku uppreistrarmenninir seg inn í næststørsta býin í landinum, Cap Haitien, men nakrar tímar seinni máttu teir taka seg aftur. Teir høvdu kortini tikið floghavnina uttan fyri býin.

## Taka metstórt vinningsbýti

Norsku partafeløgini fara ætlandi at rinda sínum partaeigarum einar 25 milliardir krónur í vinningsbýti í ár, og tað er met.

Tað sæst í einari útrokning, sum blaðið Aftenposten hevur gjørt eftir tilmælunum frá nevndunum í teimum einstøku partafeløgunum. Sambært blaðnum rindaðu norsku partafeløgini sínum eigarum einar 11 milliardir krónur í vinningsbýti í 2000 og í 2001, meðan talið lá um 17 milliardir krónur í 2002 og í fjør.

Búskaparfrøðingar, sum blaðið hevur tosað við, siga, at tað metstóra vinningsbýtið fer væntandi at gera, at partabrævavirðið fer at hækka út ímóti sumri, tí nógvir partaeigarar velja at nýta pengarnar til at keypa sær partabrøv í sínum egnu feløgum.

## Stórátak ímóti al-Qaeda

Myndugleikarnir í Pakistan fyrireika eitt stórátak ímóti vápnaðum limum í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda og stuðlum hjá gamla Taliban-stýrinum í Aghanistan.

Pakistansku myndugleikarnir og amerikanararnir vilja vera við, at nógvir viðhaldsmenn hjá al-Qaeda og Taliban fjala seg í tí illgongda fjallalendinum á markinum ímillum Pakistan og Afghanistan. Pakistan hevur í løtuni 4.000 hermenn í hesum økinum, men stjórnin hevur nú skotið upp at senda 8.000 hermenn afturat hagar. Ovastin í økinum, Muhammed Azam Khan, sigur, at ætlanin er at gera av við alla mótstøðu.

USA hevur eisini hermenn í fjøllunum á markinum ímillum Pakistan og Afghanistan. Teir leita millum annað eftir Osama bin Laden, tí hildið verður fyri vist, at hann fjalir seg har.

## Rok um rækjur

Svenskir fiskimenn, sum fiska rækjur, eru í øðini, tí norðmenn senda nógvar rækjur á svenska marknaðin við tí úrsliti, at prísurin er fallin nógv.

Ein av teimum svensku fiskimonnunum sigur við norska blaðið VG, at norðmenn hava so mikið av rækjum eftir á egnum marknaði, at teir kunnu halda prísinum har uppi. Avlopið verður sent á svenska marknaðin fyri dumpingprís, sigur hann. Sambært blaðnum hevur tað havt við sær, at tær báðar fyrstu vikurnar í ár máttu svenskir fiskimenn blaka 13 tons av rækjum burtur, tí eingin vildi hava tær. Úrslitið er, at fleiri svenskir rækjubátar eru farnir á húsagang.

Men norðmenn halda ikki, at teir gera nakað skeivt. Ein talsmaður hjá einum útgerðarfelagi í Egersund sigur við VG, at sviar vilja fegnir hava norsku rækjurnar, sum tær eru betur enn tær svensku. Hann ásannar, at gongdin sjálvandi er óheppin fyri teir svensku rækjumenninar.

## Royna alduorku í Skotlandi

Norska felagið Hydro er við stuðuli frá ES farið undir eina stóra verkætlan við alduorku í Skotlandi.

Í gjár varð ein royndarstøð løgd á sjógv við Orkneyoyggjarnar. Hon er 130 metrar long og vigar 700 tons, og higartil hevur verkætlanin kostað 80 milliónir norskar krónur. Sambært útrokningum kann ein tílík støð útvega nóg mikið av elorku til 130 húsarhald, men Hydro hevur ætlanir um at gera størri støðir, sum skulu gera orku til 4.000 húsarhald, skrivar Aftenposten.

Tað kostar umleið 60 oyru at framleiða ein kilowatttíma við hesum alduorkuverkunum, og tað er umleið tríggjar ferðir meiri, enn tað kostar at framleiða elorku við vindmegi í Noregi. Í Hydro vænta tey kortini, at tað fer at bera til at framleiða ein kilowatt-tíma fyri 30 - 40 oyru við alduorku seinni.

Talsmaðurin hjá Hydro sigur við Aftenposten, at ætlanin er at gera royndir við alduorku í Noregi seinni.